# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Iran eigur at vita, at landið fær einki burturúr at misbrúka okkara herfólk í sjónvarpinum*
*(Tony Blair)*

*Ehud Olmert helt tíðindafund saman við Angelu Merkel, kanslara, tá hann kom við innbjóðingini til friðarráðstevnuna.*



# Ísrael sinnað at halda ráðstevnu um Miðeystur

**Men Ísrael fer ikki at gera eftir arabiska kravinum um at taka seg aftur til markið, sum tað var undan krígnum í 1967**

Tað kom rættiliga óvæntað, tá ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, í gjárkvøldið boðaði frá, at stjórn hansara er til reiðar at skipa fyri einari friðarráðstevnu um Miðeystur.

- Eg bjóði øllum arabiskum ríkisleiðarum - sjálvandi eisini saudiarabiska konginum, sum eftir mínum tykki er sera týdningarmikil í hesum høpi - at samráðast við okkum, segði ísraelski stjórnarleiðarin á einum tíðindafundi, sum hann helt saman við týska kanslaranum, Angelu Merkel, sum er ES-formaður í løtuni.

Politiskir eygleiðarar í Miðeystri siga, at Ísrael noyðist at vísa eitt sindur av vælvild mótvegis Vesturheimurin, eftir at bæði USA og ES hava tikið undir við arabiska uppskotinum um, at Ísrael eigur at taka seg aftur til markið, sum tað var undan krígnum í 1967. Tað uppskotið samtyktu tey arabisku londini á toppfundi í síðstu viku. Afturfyri ísraelska afturtøku eru tey til reiðar at viðurkenna ísraelska ríkið.

Men politisku eygleiðararnir í Miðeystri eru á einum máli um, at Ehud Olmert og hansara stjórn fara ikki at góðtaka tað arabiska uppskotið. Skuldi Ísrael flutt markið á Vestara Árbakka aftur til støðuna undan krígnum í 1967, høvdu fleiri hundraðtúsund ísraelsmenn endað uttan fyri landamarkið, og eitt tílíkt stig fer ein ísraelsk stjórn ongantíð at taka, siga eygleiðararnir.

Hinvegin halda nógv fólk í Ísrael , at stjórnin eigur at taka tað arabiska lyftið um góðkenning í álvara og at smíða, meðan jarnið er heitt. Í teirra eygum kann støðan hjá teimum arabisku ríkisleiðarunum vera byrjanin til eina nýggja friðartilgongd í Miðeystri.

# Hillary sett met

**Einki amerikanskt forsetavalevni hevur nakrantíð savnað so nógvar pengar so tíðliga undir valstríðnum sum Hillary Clinton**

Tað stendur ikki á hjá Hillary Clinton at savna pening til valstríðið upp undir forsetavalið næsta ár. Washington Post skrivar, at higartil hevur hon savnað 26 mió. dollarar, sum svara til 145 mió. krónur.

Harvið hevur Hillary Clinton savnað tríggjar ferðir so nógv, sum Al Gore hevði savnað um sama mundið, tá hann stillaði upp í 1995. Hann átti metið frammanundan.

Umframt tað, sum hon hevur savnað nú, hevur Hillary Clinton 10 mió. dollarar, sum lupu av í valstríðnum upp undir senatsvalið í fjør, og teir pengarnar kann hon sambært lógini brúka til forsetavalið.



*Hillary Clinton er góður innsavnariI*

## STUTT SAGT

### Skuldi myrða sonin

Ein sjúkrasystir í Suðurafrika fekk tvinnar kostir í at velja, tá rætturin herfyri dømdi hana seka í at hava roynt at beina fyri sínum egna stjúksoni. Hon kundi velja ímillum fimm ára fongsul ella at rinda 10.000 krónur í bót, og sum vera man valdi hon tann seinna møguleikan. Tað hevur fingið fleiri í Suðurafrika at finnast at dómsvaldinum, tí tað letur fólk gjalda seg frá veruligari revsing. Í rættinum kom fram, at Pinky Mabuza hevði givið tí átta ára gamla stjúksoninum eina innspræning við hivsmittaðum blóði. Tí stendur í dóminum, at skuldi tað hent, at drongurin doyr av eyðkvæmi, skal stjúkmamman ákærast fyri morð.

### Vatnflóð og skriður

Tað hevur regnað av grimd í afghanska landspartinum Daykuni síðani hósdagin, og tað nógva regnið hevur elvt til vatnflóð og fleiri skriðulop. Guvernørurin í Daykumi, Sultan Ali Uruzgami, sigur, at minst 31 fólk doyðu hósdagin og fríggjadagin, og at fleiri lótu lív í skriðulopum leygardagin. Eisini aðrastaðni hevur tað nógva regnið kravt mannalív. Í Prawan norðan fyri høvuðsstaðin Kabul eru átta fólk deyð, og í Nangarhar har eysturi í landinum hava fimm fólk latið lív. Afghonsku myndugleikarnir siga, at tey nógvu skriðulopini hava eisini oyðilagt nógvar vegir.

### Sleppur undan revsing

Tann 38 ára gamli Darrel Robertson í Dallas í USA sleppur undan revsing, sjálvt um hann beindi fyri einum manni í desember í fjør. Søgan er í stuttum, at tá Darrel Robertson eitt kvøldið kom til hús, sótu kona hansara og elskari hennara í einum bili uttanfyri. Tá konan sá mann sín koma ímóti bilinum, rópti hon, at hann bleiv neyðtikin, og Darrel tók skammbyrsuna og skeyt mannin í bilinum. Ákæruvaldið í Texas sigur, at drápið kann roknast sum sjálvverja, og tí verður Darrel Robertson ikki ákærdur. Kona hansara er harafturímóti ákærd fyri óviljað manndráp og falskan vitnisburð og kann fáa 20 ára fongsul.